# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Alberg Danielsen**, ættaður av Kelduni í Sørvági, búsitandi í Rødovre, andaðist týsdagin 11. november á Herlev Sygehus, 83 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin 21. november kl. 13.00 úr Rødovre Kirke.

**Dagurin**
**20. november. Volkmarus**. Einki halgimenni ber hetta navnið, men navnið er komið í álmanakkarnar í 1730.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Minningarorð

Sunnudagin 5. oktober andaðist Sivert Eliasen við Garð í Fuglafirði 90 ára gamal.

Sivar, sum hann vanliga varð nevndur, var nr. 8 í barnarøðini av 12 børnum hjá Katrinu Jacobsen av Slættanesi og Símun Jóhan Eliasen úr Fuglafirði.

101 ár eftir at húsini uppi við Garð vóru bygd, og 100 ár eftir at fyrsta barnið varð borið í heim, er nú við Sivari øll farin.

Tá ið Sivar var 8 ára gamal, vórðu tey fyri tí vanlagnu at missa mammuna bert 41 ára gamla. Mosturin, Elisabeth, sum var yngst av teimum 14 systkjunum á Slættanesi, kom tá í húsið hjá systrini at hjálpa til at passa stóra húskið, og búði har til hon andaðist í 1987, 87 ára gomul.

Sivar hevði eitt langt og virkið lív. Sum ungur gekk hann við posti, fór síðani til skips, og var eisini við í tunnilsarbeiði í Borðoynni. Tey seinnu mongu árini arbeiddi hann sum egningarformaður, og tolin sum hann var, lærdi hann mangan smádrongin at egna.

Honum dámdi væl at ferðast. Hann vitjaði ofta systrina í Árnafirði og beiggjan, sum búði á Slættanesi, eisini gekk hann nógv inn til mongu systkini í Fuglafirði. Tað var hugna-



ligt, tá hann kom inn á gólvið, setti styvlarnar í gongina og legði reyðhúgvuna omaná. Hann var ein av teimum fáu í bygdini, sum dagliga gekk við føroyskari húgvu, og nú hann er farin, er eingin eftir. Sum oftast hevði hann okkurt gott til børnini, og tey eru mong, sum minnast seg hava fingið eitt oyra frá Sivari.

Einaferð eg var staddur í Klaksvík, lá Pollur á Stongunum og landaði upsa undan Íslandi. Ein av manningini var Sivar, og hann spurdi um eg ikki kom við til Árnafjarðar, tá teir vóru lidnir at landa. Tunnilin varð ikki komin, so farast mátti um Áarskarð, tað var fyrstu ferð eg var í Árnafirði.

Fyrstu ferð eg var á Slættanesi, var eisini við Sivari sum ferðaleiðara. Vit gingu av Oyrargjógv norður eftir bakkanum, um Klivarnar og Ørgugjógv, síðani á skák niðanum Klíningsgjógv, og haðani oman móti Selgjógv til Slættanes. Tað var áhugavert at hoyra og síggja, hvar ættarfólkið í móðurætt høvdu búleikast.

Seinastu 3 árini búði Sivar á eldrasambýlinum Vesturstovu, og har dámdi honum væl og tøkk skulu tit hava, sum vóru um hann har.

Friður verður við minni um Sivar við Garð.

**Systirsonur**

# Myndin sum prógv

Parkeringsvørðarnir í Tórshavnar Kommunu hava nú fingið eina elektroniska skipan, ið er tryggari bæði hjá teimum sjálvum og hjá teimum sum fáa parkeringsgjøld fyri at parkera ólógliga við t.d. at kunna taka myndir ella tekna skitsur av ólógliga parkeraða bilinum.

Talan er um eina elektroniska hondborna teldu til parkeringsvørðarnar at hava við sær til at ansa eftir at tær loyvdu parkeringstíðirnar vera yvirhildnar.

Parkeringsvørðarnir hava havt Ticketman skipanina síðan 2005, men hendan nýggja er ein uppgradering av tí fyrru og hevur munandi meira møguleikar. Til dømis hava hesar nýggju Ticketman innbygt myndatól, so parkeringvørðurin hevur myndina sum prógv, um okkurt skuldi tikið seg upp, og tann sum hevur fingið parkeringsbótina ikki er samdur við parkeringsvørðin. Eisini ber til at gera skitsur av bilinum og av staðnum, har bilurin stóð ólógliga parkeraður.

Um ein bilur er ólógliga parkeraður, tastar parkeringsvørðurin inn, hvar bilurin stendur, tíðarskeiðið, nummarplátuna á bilinum og hvat slag hann er. Útskrivaði seðilin verður lagdur í inngjaldingarkortið, sum verður lagt undir viskaran á bilinum.

Parkeringsvørðarnir arbeiða út frá Politistøðini í Havn, har allir upplýsingarnir verða lisnir inn á eina telduskipan til at hava sum dokumentatión.

Parkeringsvørðar í Tórshavnar kommunu eru: Annika Fay Joensen, Turid Skinderholm og Thordur Thorsteinsson. Tey trý siga, at hendan nýggja skipanin léttir nógv um í gerandisdegnum, og er tryggari bæði hjá teimum og hjá teimum sum fáa parkeringsgjøld fyri at parkera ólógliga.



*Parkeringsvørðarnir í Tórshavnar kommunu við nýggju Ticketman skipanini f.v.: Turid Skinderholm, Annika Fay Joensen og Thordur Thorsteinsson*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**mg**